# Dimmalætting

6 kr.

NR. 2 TÝSDAGUR 7. JANUAR 1992. 115. ÁRGANGUR



**DEKKSØLAN á Selatrað er bíligast!**
Tlf. 48195
Fartlf. 86195
Fax. 48470
*Svarar eisini um kvøldið*




Vindmylnuætlanirnar:

## Fingið grønt ljós

**Nú kann Vestas-fyritøkan langt um leingi fara undir uppsetan av mylnum í Føroyum. Vestas fekk endaliga loyvið frá landsstýrinum seinasta fríggjadag, og teir fara beinanvegin í gongd við arbeiðið**

Nú kann VESTAS fara í holtur við at seta vindmylnur upp í Føroyum. Fyritøkan fekk seinasta fríggjadag endaliga loyvið frá landsstýrinum.

Umboðsmaðurin hjá VESTAS í Føroyum, Óli G. Bech, sigur við Dimmalætting, at teir upprunaliga søktu um loyvi til 32 mylnur.

– Og nú fara vit beinanvegin undir at seta mylnur upp á Raktanga og við brennistøðirnar báðar, sigur hann.

### Arbeiði til skipasmiðjurnar

Tað eru nú umleið tvey ár liðin síðan VESTAS fyrstu ferð sendi umsókn til landsstýrið. Nógv hevur verið kjakast um mylnuætlanirnar, bæði fyri og ímóti, men nú kom so endaliga loyvið.

Óli G. Bech sigur, at talan verður um rættiliga stórar upphæddir, og at føroyingar so avgjørt fáa ein part av hesum.

– Vit hava tosað við Tórshavnar skipasmiðju um at gera eitt ávíst arbeiði fyri VESTAS. Hetta kann verða so mikið drúgt, at arbeiðið verður tryggjað til fleiri mans, bæði á Tórshavnar Skipasmiðju og á skipasmiðjuni í Vestmanna, sigur hann.

### Alt landið

Sagt verður hjá VESTAS, at teir nú fara at fyrireika seg til at seta mylnur upp í øllum Føroyum, um áhugi skuldi verðið fyri tí. Og at áhugi er fyri hesum ivast teir ikki í á VESTAS.

### Hjálpa Útvarpi Føroya

Nú Útvarp Føroya hevur avgjørt bert at senda hendinga tímar á nýggja millumbylgju sendaranum, hevur VESTAS avgjørt at koma teimum til hjálpar.

– Vit hava boðið landsstýrinum at seta eina mylnu upp í Akrabergi. Á hendan hátt kunnu vit framleiða nógv bíligari streym enn tað, ið nú verður goldið fyri streymin.

– Útvarpið skal als ikki hugsa um at rinda bygningina ella at reka mylnuna, tað gera vit. Tað Útvarp Føroya skal gera, er at rinda fyri streymin, sum í øllum førum verður rættiliga bíligur. Og gjaldið fyri ravmagnið er jú ein stórur partur av rakstrinum av millumbylgju sendaranum, sigur Óli G. Bech.

**Gdm-**

## *Marked og beskæftigelse*

MED de kommunistiske østlandes overgang til hel eller delvis demokratisering, efter at indbyggerne har levet med diktaturets åg mellem et halvt og trekvart århundrede under dække af at være folkedemokrati, er den militære spænding ved at ebbe ud, som skabte de gigantiske våbenoprustninger både i den østlige og den vestlige verden, og som begge parter har været tynget af økonomisk – de østlige lande dog i en sådan grad, at det mere end tidligere antaget er gået ud over levestandarden blandt den jævne befolkning, hvilket vi har fået syn for sagn i billedreportager fra bl.a. madforretninger med stærkt begrænset udvalg, men med køer af mennesker, der enten ikke når at få de ønskede madvarer, eller ikke har råd til at købe dem.

De vestlige landes forhåbninger til, at der af den store østlige menneskemasse efter demokratiseringen skulle skabes et kommende nyt stormarked for deres produkter, er foreløbig bristet netop på grund af de dårlige beskæftigelses- og indtægtsforhold i disse kommunistiske lande, som af ideologiske tilhængere i vesten inden afsløringen har været lovprist for at være arbejderstyrede idealsamfund med næsten paradisiske tilstande.

På Færøerne som i andre vestlige lande har der vel også været en mere eller mindre åbenlys forventning om Østeuropa som en tilbagevendende handelspartner, især efter, at den indgåede handelsaftale med EF har vist sig ikke at tilfredsstille de forhåbninger, man havde sat til muligheden af forædling af fisk, importeret utilvirket fra lande udenfor EF, som supplement til den stadig dalende fangst af kvalitetsfisk i hjemlige farvande. Hvordan dette kommer til at udvikle sig, vil den kommende tid vise; men det kan næppe blive efter opskriften fra i fjor, hvor færøske fjorde en overgang var fyldt med østeuropæiske fabriksskibe, ganske vist chartret af selskab under et EF-lands auspicier, til modtagelse af fisk, leveret utilvirket af bl.a. færøske fiskefartøjer.

Rusland og østlandene var i halvtredserne aftagere af færøsk kvalitetsspegesild, fanget fortrinsvis af gamle, forlængst udbetalte færøske kuttere og bearbejdet af færøske arbejderhænder rundt omkring på de dengang langt mindre udbyggede færøske havneanlæg end de er nutildags, nu da topbelånte færøske specialskibe i multimillionklassen fanger silden i færøsk farvand og afsætter den utilvirket nærmest til spotpris til bearbejdning og forædling ombord i østeuropæiske moderskibe.

Det er selvfølgelig al ære værd, at færøsk erhvervsliv er med til at hjælpe de hårdt betrængte østeuropæiske samfund i deres beskæftigelseskrise. Men at det sker på bekostning af det ligeledes betrængte færøske samfund med rekordhøj arbejdsløshed, er ikke særlig smart. Om ikke andet, så blot som halvfabrikata ville bearbejdelse i land af 10-15.000 tons færøskfanget sild have haft ikke så lidt betydning både i beskæftigelsesmæssig og eksportmæssig henseende i disse tider.

Og selv om de østeuropæiske lande ikke endnu er i stand til at give den pris, som færøsk erhvervsliv kræver for at opnå rentabel drift ved salg af forædlede produkter, skulle det ikke være utænkeligt, at vore salgsorganisationer indtil da finder afsætning andetsteds til fordelagtigste pris. Det har de vist sig at kunne klare hidtil.

Så skulle der igen blive en sæson med sildefangst i nære havområder senere i år, er det værd at tage bearbejdelsesmulighederne i betragtning – tilgodekommende en overgang i hvert fald for en del af den beskæftigelseshungrende gruppe af arbejdsløse herhjemme.

Ferðafólk um flogvøllin í Vágum seinasta ár:

## Ein lítil minking

**90.398 ferðafólk ferðaðust um flogvøllin í Vágum seinasta ár. Hetta er ein lítil minking frá árinum frammanundan**



Tilsamans 90.398 ferðafólk ferðaðust um flogvøllin í Vágunum 1991

Nú vit eru farin inn í eitt nýtt ár, kundi verið áhugavert at fingið at vita, hvussu nógv ferðafólk íalt ferðaðust um flogvøllin í Vágum seinasta ár. Vit hava fingið at vita frá Statens Luftfartsvæsen, at samlaða talið fyri ferðafólk, ið á ein ella annan hátt ferðaðist um vøllin í Vágum í fjør var 90.398.

Hetta er ein minking frá árinum frammanundan við sløkum 2%. Sagt verður, at hetta er eitt rímuligt tal og liggur nakað á sama støði, sum ferðafólkatalið árini 1986 og 87.

### Stóra framgongd

Á rutuni til Íslands er støðug framgongd. Seinasta ár komu 2301 úr Íslandi og 2252 fóru til Íslands. Hetta gevur so eitt samlað tal um flogvøllin, ið er 4553 ferðafólk. Hetta er ein vøkstur uppá sløk 10%, so tað má sigast ganga tann rætta vegin.

Á føroyarutuni við teimum báðum flogfeløgunum ferðaðust 80.461 ferðafólk um flogvøllin í Vágum. Seta vit hetta upp ímóti tølunum frá undanfarna ári, so er hetta ein lítil minking uppá sløk 2%.

Mánaðirnir um summarið eru teir frægastu, og hesaferð royndist juli bestur við 12.786 ferðafólkum. Ringasti mánaðin plagar at verða februar og november, og hesaferð ferðaðust bert 4095 ferðafólk um flogvøllin í februar, sum er ein minking uppá 4,6%.

### Seinna hálvár betri

Úr Vágunum frætta vit, at fyrra hálvárið var heldur slakari, hvat viðvíkur ferðafólki um flogvøllin. Men hetta gjørdist frægari sum árið leið. September, november og desember høvdu góð úrslit við 10/11% øking.

Oktober hevði stóra afturgongd, men her órógvaði dysturin í ítróttarparkini sera nógv, tí tá øktist talið við 15%, sum eisini varð afturgongdin í ár.

Sagt verður úr Vágunum, at talið í dag, uml. 90.000 ferðafólk, er eitt passaligt tal, og tey rokna við at hetta talið heldur sær. Fyri nøkrum árum síðani, tá ferðafólkatalið var í hæddini, ferðaðust 108.000 ferðafólk um flogvøllin í Vágum.

**D**

## Partarnir langt frá hvørjum øðrum

**Semingsfreistin hjá Reiðarafelagnum og Manningarfeløgunum gongur út á midnátt**

Seinnapartin í gjár kallaði Julianna Klett semingskvinna Reiðarafelagið og Manningarfeløgini til kunnandi fundar um tað, sum semingsstovnurin er komin fram til burtur úr tí fundinum, ið var millum partarnar fríggjadagin. – Semingskvinnan sigur, at partarnir vóru langt frá hvørjum øðrum, tá ið teir skiltust leygarmorgunin um fýratíðina.

Semingsfreistin gongur út á midnátt í kvøld.

Legudagarnir hjá trolarunum hildu upp at sunnukvøldið, og einastu trolararnir, sum vóru farnir út í gjár vóru Kubatrolararnir. – Vit hava tosað við Arna Poulsen skrivara í Reiðarafelagnum, sum undrar seg yvir, at hesir bátar eru farnir út av tí, at møgleikin fyri verkfalli ella verkbanni er til staðar frá í kvøld á midnátt, tí hevði verið best at bíða við at fara út til nýggju sáttmálarnir eru gjørdir, sigur hann.

**S**



Brimgarðurin í Havn

## Fá áhugað byggifeløg

**Eftir at fleiri av byggifyritøkunum, sum stóðu í vøkrum blóma í 80'unum, eru farnar av knóranum, eru tær ikki so nógvar, sum í dag eru eftir at bjóða uppá stórarbeiði sum t. d. leingjan av brimgarðin bryggjuni eystanfyri**

Tá freistin í gjár var úti í sambandi við tilboð uppá leingjan av brimgarðinum eystanfyri í Havn, vóru væl niðanfyri tíggju byggifeløg, sum høvdu biðið Landsbyggifelagið Pf. um útbjóðingartilfar móti kr. 10.000,- í veðhaldi.

Orsøkin til, at tað ikki eru so nógv byggifeløg, ið víst hava arbeiðinum á eystaru bryggju áhuga, er ikki tí, at áhugin er so lítil fyri hesum stórarbeiði, men heldur hon, at so fá byggifeløg eru eftir í dag sammett við gullárini í 80'unum. Mong av teimum byggifyritøkunum, sum tá vóru, eru farnar av knóranum, og bert nakrar "áa eru eftir.

Tilboðini, sum gevast skulu, eru lutað upp í trý, A, B. og C.

### Grót av Glyvursnesi

Tilboð A fevnir um eina leingjan av brimgarðinum uppá 100 m við eini grótnøgd uppá uml. 220.000 kubikkmetrar og 80 m leingjan av bryggjuni við 12 m atløgudýpi.

Tilboð B fevnir um eitt sindur longri brimgarð, nevniliga 150 m og við eini grótnøgd uppá uml. 330.000 kubikkmetrar og 80 leingjan av bryggju við 12 m atløgudýpi.

Síðani er tað triðja og seinasta tilboðið, tilboð C, sum fevnir um 200 m leingjan av brimgarði við eini grótnøgd uppá uml. 470.000 kubikkmetrar og 80 m leingjan av bryggju við 12 m atløgudýpi.

Alt tað grót, sum nýtast skal til arbeiðið við brimgarðinum skal takast úr grótbrotinum á Glyvursnesi.

Tilboðini uppá leingjanina av brimgarðinum og bryggjuni skulu verða Havnarskrivstovuni hjá Tórshavnar Havn í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. februar.

**B.**